

Ólavsøkugestirnir sleppa eisini at síggja snotuliga og forkunnuga arbeiðsplássið í Miðlahúsinum, har fólkini gera tilfar til Blað, Portal og Rás.



Spennandi filmsfyrivísan í Miðlahúsinum á ólavsøku

# Søguligur filmur frumsýndur í Miðlahúsinum

## Størsta, søguliga filmsverkætlanin, sum nakrantíð er gjørd í Føroyum, verður frumsýnd í Miðlahúsinum á ólavsøku

Øll hava vit hoyrt nøvn sum Jóannes Patursson og Andreas Samuelsen, men bara fáu okkara hava sæð teir á lívi. Nú fáa øll møguleikan at síggja teir, ikki á lívi, men livandi. Teir báðir eru bara tveir av monnunum, sum eru á filmsupptøkum, ið eru savnaðar og settar saman í teirri stóru verkætlanini, sum Substanz Nordisk Film í Danmark hevur framleitt.

Uni Leitisstein Hansen, sum hevur staðið fyri at savna tær gomlu filmsupptøkurnar og at samskipa verkætlanina sum heild, sigur, at verkætlanin hevur fingið sera góða móttøku millum fólk. Nú tey gomlu filmstólini eru farin í søguna fyri langari tíð síðani, vóru fleiri farin at ivast í, hvat tey skuldu gera við tær gomlu rullurnar, og tey vóru tí fegin um, at upptøkurnar hóast alt kundu brúkast til okkurt gott.

Tað hevur ikki staðið á at fáa fatur á gomlum filmum, og tilsamans fingu fyriskipararnir umleið 500 filmsupptøkur. Tann elsta er frá einari kongavitjan í havn í 1907, men tann mest áhugaverda er kanska ein filmur, sum ein oyndfirðingur, sum búði niðri, tók á einari vitjan í Føroyum í 1930-árunum. Uni Leitisstein Hansen sigur, at hetta er ein sera áhugaverd upptøka, sum gevur eina góða lýsing av føroyska samfelagnum, sum tað tá var.

Eik-Grunnurin hevur fíggjað verkætlanina. Per Højgaard, kunningarleiðari hjá Eik-samtakinum, sigur, at grunnurin er fegin um at vera við til at varðveita tann føroyska filmsarvin. Sjálvur hevur hann sæð filmin og sigur, at fólk hava veruliga nakað at gleða seg til, nú filmurin verður sýndur.

Filmurin »Føroyskar søgur« verður sýndur fyrstu ferð í Miðlahúsinum sunnudagin 27. juli klokkan 15.

... eina góða ólavsøku